*Framhald av síðu 7*

eftir og so hava vit eisini fingið góðar blokkar í Norðsjónum.

Hyggja vit eftir feløgunum, sum eru við, so siggja vit, at her eru fleiri nyggj feløg, sum ikki hava verið serliga virkin á Atlantsmótinum fyrr.

Hesi eru m.a. Anadarco, Pan Canadian og Korean Petroleum. Hetta eru feløg, sum møguliga eisini kunnu hugsast at fara at vísa føroyska økinum ans sum frálíðir. M.a. vísti Anadarco áhuga fyri at vera við í Lopransboringini.

Sosialurin skilur, at umhvørvisfelagsskapurin Greenpeace skal eisini hava søkt um at fáa tillutað blokkar í hesi seinastu rundum, men av tí at hetta ikki er eitt oljufelag hevur tað ikki fingið nakað oki tillutað.

**Felagið fyri Skrivstovu- og krambafólk**

Upplýsir um:
– sáttmálan
– starvsmannalógina
– frítíðarlógina o.a.

**Gerist limir – so standa vit sterkari**

**Tlf. 16837**
**Traðarvegur 20**
**Boks 1378**

Opið er soleiðis:
Mánadag–fríggjadag
kl. 9.00–12.00

*Kvøldskúlanæmingar spæla sjónleik:*

# 5 violettir flugusoppar

Í løtuni spælir sjónleikarabólkurin »piparnøturnar«, sum er vorðin til undir kvøldskúlanum, ein leik í Sjónleikarhúsinum.

Hesin leikurin er ikki vorðin til sum vanligir leikir, har tú fyrst hevur eitt leikrit, og so vinnur tú nakrar leikarar, sum kunnu leika.

Her høvdu tey at byrja við ein rithøvunda/leikstjóra og 10 gentur, sum skuldu læra at skriva og spæla sjónleik. Tær gjørdu hvør ein persón við øllum karaktereyðkennum, sum hoyrdi hesum til, og síðani gjørdu tær søguna um hesar 10 persónarnar.

»5 violettir flugusoppar« kom leikurin at eita. Hendingarnar liggja og rilla onkrastaðni millum droym og veruleika, vit møta vanligum skúlagentum og løgnum hugflogsverum í eini søgu so ótrúligari, at persónarnir sjálvir av og á ivast í, um tær droyma ella ikki.

1. sýning var sunnudagin o 2. í gjár. Leikurin verður bara sýndur 2 ferðir aftur at, týskvøldið og mikukvøldið kl. 19. Atgongumerki á 25 kr. eru at fáa við dyrnar.





tíðindablaðið
**sosialurin**
**Box 76,**
**110 Tórshavn**

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið **5 ferðir um vikuna**

| | | |
|---|---|---|
| ☐ | Haldarar í Føroyum: | 235,-/ársfj. |
| ☐ | Haldarar í Danmark: | 425,-/ársfj. |
| ☐ | Haldarar í Danmark: (5 bløð í senn) | 340,-/ársfj. |
| ☐ | Onnur lond: | Ymiskir prísir |

**Tað ber altíð til at gerast haldari og goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av ársfjórðinginum**

**Navn:** ..........
**Bústaður** ..........
..........
**Postnr. bygd/býur** ..........
..........
**Tel.:** ..........
**Undirskrift:** ..........

